# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

21. juni fingu Joan við Neyst og Jan Olaf Michelsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 2910 gr.

22. juni fingu June-Eyð Johannesen og Jóannis Joensen, Hvítanesi, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 4700 gr.

23. juni juni fingu Ramona og Flemming Petersen, Syðrugøtu, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3330 gr.

24. juni fingu Marna Joensen og Bogi Slættanes, Argjum, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 3850 gr.

24. juni fingu Rannvá og Benjamin Gøte, Leirvík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigðai 3950 gr.

24. juni fingu Malan Hansen og Eyðfinn Jensen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3850 gr.

24. juni fingu Miriam og Dan Hjelm, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3100 gr.

25. juni fingu Helen Niclasen og Levi Lauritsen, Sørvági, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3625 gr.

26. juni fingu Joan og Jaspur Tausen, Toftum, eina dóttur. Hon var 46 cm long og vigaði 1890 gr.

26. juni fingu Súnfríð og Rógvi Jacobsen, Toftum, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 2780 gr.

27. juni fingu Marita Hansen og Axel Mc Intosh, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon vigaði 3300 gr. og 50 cm long.

28. juni fingu Unn og Gisli Poulsen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3300 gr.

28. juni fingu Annika Petersen og Bjarni Árting Rubeksen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3100 gr.

28. juni fingu Jónley og Hans Poulsen, Sørvági, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4100 gr.

28. juni fingu Gudny og Jónar Randrup, Hvalba, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3050 gr.

29. juni fingu Ragnhild og Petur Sigurd Justesen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3985 gr.

## Kommunumaður í Mykinesi

Nakað herfyri samtykti Sørvágs Kommuna at seta Kjeld Nattestad, at gera ymiskt fyrifallandi arbeiði fyri kommununa í Mykinesi.

Kjeld kemur samstundis við hetta, at hava umsjón við ognunum hjá kommununi á staðnum.



*Kjeld Nattestad er nýggjur kommunumaður í Mykinesi*
*Mynd: Sørvágs kommuna*

# Óli hjá Meinhard á Gulldrangi fyllir 60



Leygardagin fyllir fuglfirðingurin Óli Jacobsen hjá Meinhardi á Gulldrangi 60 ár. Pundini tyngja hann ikki, hann er lættur upp á bein, og tú sær hann dagliga ganga túr við hundi sínum Max, ein øgiligur, lágur og loðin fýrbeintur skabningur, sum er í ætt við navnframar hundar heilt afturi í Ming-dynastinum í Kina, afturi í fyrndini. Tað er ikki nøkur løtt uppgáva at tosa við ein hund í allari almindiligheit og so enntá á kinesiskum, men Óli og Max skilja hvønn annan, væl at merkja um Max fær sín vilja og tað fær hann altíð

"Óli gerst ein býarmynd, líka mikið hvar hann býr", segði systurdótturin, Hildigun, tá ið hon ringdi og segði frá og bjóðaði í føðingardagin. Og rætt hevur hon. Eg minnist hann fyrstu ferð í Fuglafirði fyri mongum árum síðan, og kløn fólk halda sær so væl. Hann er einki broyttur hesi seinastu 30 árini, jú kanska eru hárini fækkað, men sigarettin hongur har enn og tú hoyrir hann langan veg av harkunum, sum koma av drúgvari og miðvísari royking.

Óli var ein býarmynd í Fuglafirði og altíð sást tú hann við havnalagið. Hann sigldi í fleiri ár við kubabátunum, og hann hevur verið við øðrum skipum fyrr. Vit hittust fyrstu ferð fyrst í sjeytiárunum, tá ið oyndfirðingar plagdu at lossa sildamjøl í Fuglafirði. Eitt lúsa arbeiði, tungt og ónossligt, illa luktandi, men deiliga fongríkt, hvat peningi viðvíkur.

Seinastu fimm árini hava vit verið grannar í Havn. Óli er fluttur til Havnar, er fluttur inn hjá systurdóttrini Hildigun og manninum Agnar, tey búgva røttu megin í Ovarugøtu í býlinginum Inni á Gøtu, á gomlu torvheiðunum í Hoyvíkshaganum. Og var hann býarmynd í Fuglafirði, so er hann tað eisini í Ovarugøtu. Tú leggur merki til, tá íð hann er burturstaddur og tú leggur merki til hann, tá íð hann er úti og svalir, tí á at líta bítska, treiska, men annars góðsliga, rísna, lágbeinta kinesaran, hvørs miðja næstan tekur í asfaltið og til gongu er hann nógvar ferðir um dagin. Um tað er tubbakið, brent og sogið og andað inn í Guds fríu náttúru, ið dregur ella vælveran hjá hundinum finni eg ongantíð út av soleiðis av álvara, kanska bæði, hví ikki?

Og prátini eru nógv vit fáa í túninum hjá okkum í Ovarugøtu 1. Hann býr í Ovarugøtu 15, um eg telji rætt. Tað er ikki langt í millum og gjøgnum Óla fylgi eg mangan við, hvat hendir kring landið, hendingar sum fjølmiðlarnir ikki taka upp. Óli fylgir væl við, og serliga innan fiskivinnuna og hóast hann nú gongur sum ein spelkin pensionistur í Havn, so eru tankarnir við bryggjukant í Fuglafirði, og tú fært at vita um útróður, vánaligan prís á Toftum, og um toskurin tekur í feska gággu ella ræsta gággu, alt eftir hvussu svangur hann er. Vit eru báðir bygdamenn í Havn, eysturoyingar í Havn og Óli fylgir væl við doyr og hvør fyllur í okkara heimaoyggj. Óli setir lív aftur í andlátini í útvarpinum, tí tað eru so nógv har norðuri, sum eg ikki kenni, og kanska lívgi eg hann eisini á hesum økinum, tá ið hann stendur fastur, men tað man vera sjálvdan. Og vit tosa nógv um hvør man roynast frægast, oyndfirðingar ella fuglfirðingar. Í mínum eygum er ongin ivi, heldur ikki í Óla´sa, og vit eru slett ikki samdir um hetta mál, og eg haldi, at eg havi rætt.

Og Óli heldur eyga við grannalagnum, liggur okkurt og flýtur, so sigur hann frá, stendur eitt vindeyga opið í býlingshúsinum ella okkurt er áfatt, so ger hann vart við tað. Rundurnar í grannalagnum við sigarett og hundi geva okkum eina kenslu av at alt er í góðum hondum.

Føroyar eru mangan ov trongar fyri Óla, og so pakkar hann sekkin og fer til stroks. Hann er ein sannur globetrottari og hann plagar at ferðast samn við bróðrinum Jákupi, sum hevur búð niðri í mong Harrans ár. Og heim aftur komin er hann fullur av tíðindum av europeiska meginlandinum ella frá sólríku strondunum fyri sunnan, sum eru fyltar av brúnum holdi, hvørs eggjandi litur á ein ella annan hátt eigur at órógva sjálvt tann mest forherðaða ógifta í Føroyum.

Hjartaliga tillukku við degnum góði Óli. Vit í Ovarugøtu halda so ótrúliga nógv av tær og gøtan er tómlig, tá ið tú er á ferð.

Blíðan byrð og góða eydnu.

Heilsan
**Jústinus Leivsson Eidesgaard**

## Heilsudagur fyri alla familjuna

**Sørvágur:** Sunnudagin skipar Sørvágs kommuna fyri einum heilsutiltaki, sum er fyri allar borgarar í kommununi – og onnur áhugað.

Endamálið við tiltakinum er at fáa fólk at hugsa um heilsuna og at fáa tey at røra beinini eina løtu ella báðar tvær.

Byrjaði verður kl. 15 við SÍ-húsið, har upphiting verður og borgarstjórin, Jákup Suni Lauritsen fer at siga nøkur orð. Síðani fáa fólk høvið at ganga tríggjar ymiskar rutur.

Tann stytsta rutan – uppá 3 km. – er løgd runt í bygdini, og verður her serliga hugsað um tey eldru og børnini. Hinar báðar ruturnar eru ávikavist 5 og 7,5 km. og eru báðar eftir Bíggjarvegnum – tann styttra út í Breiðá og tann longra oman í bygdina í Bø.

Tá fólkið er afturkomið til SÍ-húsið um 16:30-tíðina verður frukt og vatn at fáa. Við hetta høvið fáa eisini allir luttakararnir handað eitt heiðursprógv fyri luttøkuna. Við tiltakið er somuleiðis møguleiki at fáa mált blóðtrýstið, bæði áðrenn og aftaná gongutúrin.

Hetta er fyrstu ferð at Trivnaðarnevndin í Sørvágs kommunu skipar fyri slíkum tiltaki. Óhugsandi er kortini ikki, at hetta verður gjørt aftur tey komandi árini.

**sb**